

## Sjáldsom vitjan

Forsetin í Turkalandi, Abdullah Gul, kom í gjár til grannalandið Irak á almenna vitjan, og hetta er fyrstu ferð í meiri enn 30 ár, at ein turkiskur ríkisleiðari vitjar har. Í gjár hitti turkiski forsetin irakska forsetan, Jalal Talaban, og Nuri al-Maliki, forsætisráðharra. Hann skal eisini hitta Nechirvan Barzani, sum er leiðari í tí kurdiska partinum av Irak, sum er við turkiska markið. Seinast ein turkiskur forseti var í Irak og vitjaði, var í 1976, tá Fahri Koruturk vitjaði irakska forsetan Ahmed Hassan al-Bakr.

# Fiskidagaskipanin klárar ikki lívfrøðiligu ráðgevingina

**- Verandi fiskidagaskipan klárar ikki at flyta seg í mun til lívfrøðiligu ráðgevingina hjá Fiskirannsóknarstovuni. Hon er ikki nóg gyrðin og krevur tí stórar ábøtur, um vit frameftir skulu selja okkum sum tjóð við burðardyggari fiskiveiði og vinnu, segði Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður og fyrrverandi landsstýrismaður í tilfeingismálum á flokstingi Tjóðveldisins í Skálavík**

FLOKSTING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tórbjørn Jacobsen byrjaði í síni framløgu um fiskivinnumál heilt aftur í tíðini, tá føroyska samfelagið flutti seg úr landbúnaðarsamfelagnum við smávegis útróðri, til at gerast eitt meira og meira framkomið samfelag, sum í stóran mun hevur staðið á inntøkum frá fiskiskapi og fiskavirking.

- Í næstan 100 ár troyttu vit tey frælsu høvini og síðan innanvert avmarkingarnar, sum vórðu ásettar, tá lond til endans fluttu fiskimørkini út á 200 fjórðingar. Síðan tá hava vit í stóran mun livað av tilfeinginum á landgrunninum og Føroya Banka, eins og av fiskiveiði í fremmandum sjógvi, sum við tíðini er íkomin eftir umbýti við fremmand veiðirættindi í føroyskum sjógvi. Onkur søgulig rættindi í altjóða sjógvi eru tó undantikin hesum, legði hann aftrat.

Løgtingsmaðurin helt ikki, at føroyingar høvdu fyrireikað seg til tað stóra umskiftið og til hesar avmarkingar.

- Flotin, sum nú mátti lívbjarga sær innanvert 200 fjórðingar, var ætlaður til heilt aðrar umstøður, og soleiðis mundi eisini veiðiorkan vera í størra lagi. Valið stóð ímillum at gera neyðugar strukturbroytingar – ella einki at gera.

Tórbjørn helt fyri, at føroyingar í hesum umskifti valdu at gjalda seg burtur úr íkomnu støðuni.

- Úrslitið var, at tað fossaði út í báðum borðum, bæði úr fiskastovnunum og úr einum meira og minni sperdum landskassa.

Hann vísti á, at tá brakið, sum hann kallaði tað, kom í 1992, høvdu vit brent miljardir av í stuðli til vinnuna, eins og 7.000 føroyingar tá av vantrivnaði og svongd noyddust at leita sær í fremmand lond at finna sær lívslunnindi.

- Tá varð farið undir at finna aðrar skipanir fyri at loysa ráfiskakonseptið av, sum hann málbar seg.

Tórbjørn segði, at Føroyar í kreppuárunum vórðu settar undir fremmanda umsiting.

- Finnast skuldi farvegur burtur úr tíðini við almennum veðhaldum, almennum lánum, rakstrarstudningum, kilostudningum, oljustudningum og øðrum skipanum, sum í alt ov rúma tíð høvdu hildið einum skeivum fiskiflota gangandi.

### Fiskidagaskipanin

Sum tíðin leið, gjørdust menn til endams samdir um, at fiskidagaskipanin var rætta leiðin at ganga.

- Menn royndu at fáa flotan útaftur, skipini sum fyri ein stóran part vóru snúraði gjøgnum konkurskaruselluna vórðu latin monnum lagaliga, og semja var til endans um, at fiskiloyvini skuldu galda 10 ár fram í tíðina. Teir, sum átóku sær at virka í vinnuni um hetta mundið og soleiðis stóðu við skivuna, tá loyvini vórðu útflýggjað, fingu óskerdan brúksrætt til tilfeingið – ogn Føroya fólks í eitt 10 ára skeið.

Tórbjørn helt fyri, at við økisfriðingum og einum nógv skerdum dagatali hesi fyrstu árini, er mangt, sum bendir á, at skipanin í nógvar mátar virkaði í uppgongu, bæði búskaparliga og stovnsrøktarliga.

- Men nú sveipið vendi, sum Tórbjørn tók til, gjørdist tó greitt, at fiskidagaskipanin als ikki er so lýtaleys kortini, sum hildið hevur verið. Hon megnar ikki at flyta seg í mun til lívfrøðiligu tilráðingina frá Fiskirannsóknarstovuni, og har við er hon ikki nóg gyrðin.

Løgtingsmaðurin legði dent á, at fiskidagaskipanin krevur stórar ábøtur, um vit frameftir skulu selja okkum sum tjóð við burðardyggari fiskiveiði og vinnu.

- Í eina tíð hevur verið kjakast um eitt slag av endurmeting. Mong hava hildið, at skipanin er stirvnað, og at hon er umsitin nakað av leið. Serliga nú loyvini, soleiðis sum tey hava verið handlað, eru farin at líkjast meira einum ognarrætti heldur enn einum brúksrætti. Mangt bendir tí á, at landsstýrismenninir í fiskivinnumálum hava knæsett eina siðvenju, sum hevur flutt ognarrættin frá fólkinum til teirra, sum í síni tíð fingu fiskiloyvini – brúksrættin – frá tí almenna.





*Millum tey mongu, sum vóru á flokstingi Tjóðveldisins í Skálavík í vikuskiftinum, var tað Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, sum dró ímóti tí, ið Tórbjørn Jacobsen førdi fram. Teir báðir eru ikki so samdir um leiðina frameftir*
*Mynd: Gunnar Bjarnason*

Tórbjørn Jacobsen segði, at um henda gongdin heldur fram og teir, sum nú og í framtíðini ætla sær at gerast aktørar í føroyskari fiskiveiði skulu gjalda risaupphæddir fyri loyvir, so legitimerar lógin eina feudalskipan, sum ongantíð var ætlað.

- Vit eru tí endaði í einum fólkaræðisligum trupulleika, har vit hava fingið eitt demokratiskt undirskot, sum onkur hevur tikið til.

Hann helt, at um skipanin heldur fram við verandi gongd, er vandi eisini fyri, at vinnan ikki hórar undan skuldini, sum verður upptikin, meðan somu upphæddir vera slúsaðar úr vinnuni.

- Hetta tænir ongum endamáli og kann í ringasta føri um heilt stutta tíð leggja trýst á politisku skipanina, soleiðis at konseptið frá miðskeiðis í sjeytiárunum og fram til hitt stóra brakið í 1992.

Løgtingsmaðurin helt fyri á flokstinginum í Skálavík, at tað er bara eitt vakið Tjóðveldi, sum higartil hevur forðað fyri, at stuðulsmekanismurnar, sum hann tók til, ikki longu eru skipaðar av nýggjum.

### Ein tilfeingisbúð

- Flestu eru samd um, at eitthvørt má gerast fyri at finna aftur á beint. Fólkaflokkurin hevur skotið upp at brandskatta sølurnar við